Í millum øðrumegin **Føroya Pedagogfelag**

og hinumegin **Fíggjarmálaráðið** og **Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

verður gjørd henda semja.

**Sáttmálaskeið og lønarhækkingar**

Sáttmálarnir og tænastumannaavtalan verða endurnýggjað fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2017 til 1. oktober 2020.

Tann 1. oktober 2017 hækka mánaðarlønirnar fyri sáttmálasettar pedagogar og hjálparfólk:á stig 1-11 við 400 kr.

Á stig 12-21 verður 2,0% løgd afturat hvørjum stigi. (eksponentiel)
Á stig 22-35 verður 1,5% løgd afturat hvørjum stigi. (eksponentielt)

Tann 1. oktober 2018 hækka mánaðarlønirnar á stigi 1-11 við 400 kr. Tann 1. oktober 2019 hækka mánaðarlønirnar á stigi 1-10 við 400 kr. Stig 11 hækka mánaðarlønirnar við 500 kr.

Tann 1. okt. 2017 og 1. okt. 2018 hækkar mánaðarlønin hjá tænastumannasettum pedagogum við 400 kr. Tann 1. okt. 2019 hækkar mánaðarlønin hjá tænastumannasettum pedagogum við 500 kr.

**Eftirløn**

§ 7, stk. 1 í sáttmálanum fyri hjálparfólk verður broytt soleiðis:
Arbeiðsgevari rindar eftirlønargjald á 12 %. Broytingin er galdandi frá 1. februar 2018.

Nýtt § 21, stk. 1, litra c verður skrivað í sáttmálan:

Frá 1. februar 2018 verður eftirløn goldin av tímaløn. Eftirlønargjaldið fylgir bundna eftirlønargjaldinum, ið er ásett í § 2, stk. 1 í eftirlønarlógini (ll. nr. 49/2013), p.t. 4%.

**Broyttar skála gongdir**

Í sáttmálanum fyri pedagogar verður § 3. Løn A., B , C og D broytt soleiðis, at pedagogar verða løntir á lønarstigunum 11, 12, 13, 14, 15, 16, 17, 18, 19 og 20.

Galdandi frá 1. oktober 2018:
Í sáttmálanum fyri pedagogar verður § 3. Løn A., B , C og D broytt soleiðis, at pedagogar verða løntir á lønarstigunum 11, 12, 13, 14, 15, 16, 17, 19 og 21.

Galdandi frá 1. oktober 2019:
Í sáttmálanum fyri pedagogar verður § 3. Løn A., B , C og D broytt soleiðis,at pedagogar verða løntir á lønarstigunum 11, 13, 14, 16, 17, 19, 21 og 22.

Námsfrøðingar, sum tann 1. oktober 2017 hava verið longri enn 2 ár á stig 19, verða fluttir á stig 20.

Námsfrøðingar sum tann 1. oktober 2018 hava verið longri enn 2 ár á stig 19 verða fluttir á stig 21. Námsfrøðingar sum standa á stig 20 tann 1. oktober 2018 flyta á stig 21.

Námsfrøðingar, sum tann 1. oktober 2019 standa á stig 21 flyta á stig 22.

Námsfrøðingar, sum tann 1. oktober 2019 standa á stig 12, 15, 18 flyta á nærmasta hægra stig.

Í avtaluni fyri tænastumannasettar pedagogar verður § 3, B broytt soleiðis, at pedagogar, løntir á lønarstig 32 og 33, fáa eina ikki eftirlønargevandi viðbót. Viðbótin verður ásett soleiðis at lønin hjá einum tænastusettum verður tann sama sum hjá einum sáttmálasettum á tilsvarandi lønarstigi.

Galdandi frá 1. oktober 2019:

Í sáttmálanum fyri hjálparfólk verður § 3, stk. 2 og 3 broytt til:

Stk. 2. Hjálparfólk, ið arbeiða á dagstovnum, sum eru riknir sambært dagstovnalógini, verða lønt á lønarstigunum 2-8.

Stk. 3 Onnur hjálparfólk og hjálparfólk, ið sita í stuðulspedagogstørvum, verða lønt á lønarstigunum 3-9.

**<u>Leiðarabólkar</u>**

Leiðarar byrja 3 stig omanfyri endastigið hjá námsfrøðingum.

**<u>Leiðarar § 3, A:</u>**

Tann 1. oktober 2017 broytast bólkarnir fyri dagstovnaleiðarar, sum víst niðanfyri:

*Leiðarar flyta í nýggjan lønarskala við fullum starvsaldri.*

- Leiðarar: 0 – 119 - ganga stigini 25, 27, 29
- Leiðarar: 120 – 289 - ganga stigini 29, 31, 33
- Leiðarar: 290 – ganga stigini 31, 33, 35

**<u>Varaleiðarar:</u>**

Varaleiðarar á dagstovnum 0 –119 + eitt stig

Varaleiðarar á dagstovnum: 120 – 290 + 2 lønarstig

Varaleiðarar á dagstovnunum: 290 – + 2 lønarstig

*Skiftisskipan: Varaleiðarar, sum í dag fáa +3 stig halda fram eftir gomlu skipanini.*

**<u>Viðv. § 3, C Leiðarar</u>**

0 – 15 stig verða løntir á lønarstigunum 26, 28, 30.

15,01 – 25 stig verða løntir á lønarstigunum 27, 29, 31

25,01 – stig verða løntir á lønarstigunum 29, 31, 34

Hetta er galdandi frá 1. oktober 2017. Leiðarar, ið eru løntir á fyrsta stigi verða fluttir á nærmasta hægri stig. Leiðarar, ið eru á endastigi tann 1. oktober 2017, verða fluttir á nýggja endastigið.

**Hjálparfólkasáttmálin**

**<u>Nýggj flokking til námsfrøðiligan atstøðing</u>**

Námsfrøðiligir atstøðingar ganga stigini 6 – 10.

*Skipanin við hjálparfólki við pedagogiskari ábyrgd heldur fram í eini skiftistíð, so leingi, at tað er neyðugt at seta hjálparfólk at røkja hesa uppgávu. Hjálparfólk við pedagogiskari ábyrgd ganga stigini 6 – 9.*

**Barnsferð**

Ásetingarnar um barnsferð verða soljóðandi:

"Starvskvinna, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing. *stk. 2.* Starvskvinna hevur rætt til barsilsfarloyvi við løn í 4 vikur undan mettari føðing og í 24 vikur eftir føðing, t.e. 28 vikur tilsamans.

*stk. 3.* Prógvar *starvskvinna* við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør 4 vikur ella fyrr undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og starvskvinna hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2. Samlaða barsilsfarloyvi við løn er framvegis 28 vikur.

*stk. 4.* Umframt nevndu sømdir kann starvskvinna fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

*Stk. 5.* Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.

Stk. 6. Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í sambandi við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.

Stk. 7. Umframt farloyvi nevnt í stk. 2-6, hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. "

Broytingin hevur gildi tann *dagin semjan er undirskrivað.*

**Gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð**

Gjøldini fyri ólagaliga arbeiðstíð verða latin sum ásett í lønartalvuni og í talvuni um gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð, ið verður løgd sum fylgiskjal til sáttmálan.

**Setanarbræv og starvslýsingar**

§ 14, stk. 3 í pedagogsáttmálanum verður broytt soleiðis, at orðingin um, at lýsast skal í minst einum føroyskum blað verður strikað. Hetta er eisini galdandi fyri § 20, stk. 2 í hjálparfólkasáttmálanum.

Í staðin kemur at standa, at starvið skal lýsast leyst alment, á ein slíkan hátt at almenningurin verður kunnugur við lýsingina.

> Viðm.
> Hetta kann gerast við at lýsa í bløðunum, umframt á internetsíðum, ið hava stóra útbreiðslu, ið mun til konkreta málbólkin og har almenningurin kann væntast at vita, at størv verða lýst. Arbeiðsgevarar eiga at senda starvslýsingina til Føroya Pedagogfelag, ið leggur hana á heimasíðu felagsins.

**Partarnir eru samdir um hesi protokollat:**

**<u>Útbúgving:</u>** Sáttmálapartarnir eru samdir um, at tað er neyðugt at (eftir)útbúgva leiðslurnar á dagstovnaøkinum. Partarnir eru samdir um, at ein námsfrøðilig leiðsluútbúgving eigur at verða sett á stovn í samráð við Fróðskaparsetur Føroya.

Sáttmálapartarnir eru somuleiðis samdir um, at partarnir saman við Mentamálaráðnum umrøða møguleikarnar fyri at seta á stovn eina útbúgving fyri hjálparfólk.

**<u>Eldraøkið:</u>** Sáttmálapartarnir eru samdir um at kanna grundarlagið fyri at raðfesta námsfrøðilig størv á eldraøkinum. Námsfrøðilig størv á eldraøkinum verða lønt samsvarandi galdandi sáttmála.

**<u>Arbeiðstíðarreglur:</u>** Partarnir eru samdir um, at bólkur verður settur at gera uppskot um arbeiðstíðarereglur fyri kommunala sáttmálaøkið.

**Tórshavn, tann 14.01.2018**

**Fyri Føroya Pedagogfelag**

**Jógvan Philbrow, formaður**

**Fyri Kommunala arbeiðsgevarafelagið**

**Annika Olsen, forkvinna**

**Fyri Fíggjarmálaráðið**

**Kristina Háfoss, landsstýrisskvinna**